Stjórin:

# - Rættiliga nógv missa pening

**Stjórin í Phoenix í Danmark, Claus Schæfer váttar at fyritøkan er í trupulleikum. Hvussu nógvur føroyskur peningur er í vanda fyri at verða mistur, kann hann ikki siga nakað um enn**

FÍGGJARHEIMUR
*Snorri Brend*

- Yes, you are right. We've problems!

Soleiðis segði enskttalandi stjórin í donsku deildini av "Phoenix Kapitaldienst", Claus Schæfer beint eftir middag í gjár.

Allan fyrrapartin høvdu fólk, ið hava sett pening í fyritøkuna, ringt hana – og hann! - niður fyri at fáa at vita, hvat var á vási. Og ikki minst, um teirra peningur framvegis var í góðum hondum.

Vit tosaðu við telefondamuna, og hon váttaði beinanvegin, at fyritøkan var í trupulleikum. Hon stillaði okkum síðani víðari til ein annan mann, sum ikki vildi upplýsa okkum um, hvussu nógvur føroyskur peningur er í vanda fyri at verða mistur. Bæði tvey vístu til stjóran. Men hann kundi lítið siga.

– Eg havi úr at gera bara við at taka telefonina, segði hann við Sosialin.

Hann hvørki vildi ella kundi upplýsa, hvussu nógvan pening, ið føroyingar høvdu sett í felagið. Tað yvirlitið hevði hann ikki við hondina.

Claus bað okkum tosa við seg einaferð seinni um kvøldið.

– Men eg kann tó siga so mikið, at fleiri fara at missa pening, segði Claus Schæfer, meðan næsta telefonin lá og bíðaði eftir honum.

# Føroyingar missa milliónir




*At týska íløgufelagið Phoenix hevur verið virkið í Føroyum sæst m.a. á hesi reklamuni á B36 húsinum í Gundadali*

*Mynd Jensk Vang*

ÍLØGUVIRKSEMI
*jan@sosialurin.fo*

Føroyingar hava mist fyri kanska 100 mill. kr. í einum týskum íløgufelag, sum varð stongt hóskvøldið. Keldur Sosialurin hevur tosað við meta, at einstaklingar og fyritøkur í Føroyum hesi seinastu árini hava sett stórar peningaupphæddir í týska íløgufelagið "Phoenix Kapitaldienst", sum hevur dyrgt við upp í 10 og 15% í avkasti/-rentu. Tilsamans 600 mill. euro av íalt 800 mill. euro eru horvnar stendur í grein í Berlingske Tidende og eisini endurgivið á DR heimasíðuni. Umleið 150 mill. euro koma frá íleggjarum í danska kongaríkinum herímillum Føroyum. Talan er um stuldur og falsknarí av skjølum og talan er meira og minni um totaltap. Tvs. at her verður einki at heinta aftur skilst.

– Hetta er eitt sera, sera stórt problem. Íleggjararnir koma at missa nógvar peng-ar uppá hetta sigur Claus Schäfer, stjóri fyri donsku deildina hjá Phoenix.

Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka sigur í stuttari viðmerking, at hann er vitandi um, at føroyingar hava sett stórar upphæddir í felagið. – Okkara varhugi er, at týska felagið hevur verið virkið í Føroyum í nógv ár, og at føroyingar hava sett rættiliga fittar upphæddir í felagið.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag


Vika 10, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin kann vikna enn meira

MARKNAÐARRÁK

Undirskotið á amerikanska handilsjavnanum vaks í januar mánaða úr 55,7 mia. til 58,3 mia. dollarar. Tað er í stóran mun merkt av, at altjóða handilskvotur fyri klæðir vórðu strikaðar 1. januar. Klæðir verða í stóran mun innflutt úr Kina. Hendan gongdin sær út til at kunna halda fram, og harvið framhaldandi leggja trýst á handilsjavnan.

Tað er áhugavert, at høgi oljuprísurin ikki hevur havt nakra serliga ávirkan á handilsjavnan enn. Um oljuprísurin heldur sær á hesum høga stigi, kann hann einsamallur økja um undirskotið við umleið 4 mia. dollarum í februar ella mars. So er talan um størsta undirskot nakrantíð, og tað kann fáa dollaran at vikna enn meir frá teimum 1,34, ið fáast fyri hvørja evru í løtuni.

### Lánsbrævarentur sveiggja enn

10-ára danska lánsbrævarentan helt áfram at sveiggja millum 3,75% og 3,90% í síðstu viku. Tó var rákið uppeftir. Støðan á lánsbrævamarknaðinum er merkt av, at íleggjarar ikki eru samdir um, hvørt rentuhækkingin í februar var nóg stór ella ikki. Tískil kann væntast, at 10-ára rentan fer at halda áfram við stóru sveiggjunum millum 3,70%-3,95% nakað aftrat.

### Norrøn partabrøv

Sum áður mett, staðfestu partabrævaíleggjarar vinning í farnu viku. Hetta hendi eftir at norrøn partabrøv støðugt hækkaðu undanfarnu seks vikurnar, og fekk virðið á teimum at minka eitt sindur aftur. Dollarakursur, oljuprísur og amerikonsk smásøla fara at ávirka gongdina á partabrøvum hesa vikuna.

### Hesa vikuna

Amerikanska gjaldsjavnahallið fyri 4. árfjórðing 2004 og útlendsk keyp av amerikonskum virðisbrøvum í januar verða kunngjørd hesa vikuna. Marknaðirnir vænta størri gjaldsjavnahall og óbroyttan eftirspurning eftir amerikonskum virðisbrøvum. Hetta eru sera týðandi lyklatøl fyri dollarakursin, sum kann broytast nógv, um tølini ikki verða sum væntað.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,53 | -1,6% | ↓ |
| JPY | 5,32 | -0,3% | ↓ |
| GBP | 10,66 | -1,2% | ↓ |
| NOK | 0,91 | 1,0% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,94 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 171,11 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 91,23 | -1,6% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 60,69 | -1,8% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*